# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Flogfarið var sum ein risastór, logandi eldkúla, og tað luktaði av petroleum og svávuli*

*(eygnavitni í Sao Paulo)*

# Landasorg í Brasil

**Flogvanlukkan á Congonhas-flogvøllinum í Sao Paulo er tann ringasta í Brasil nakrantíð, men hon kom ikki óvart á øll**




*Flogfarið fór á glið og rendi á eina bensinstøð og ein bygning*

Øll tey 176 ferðafólkini, manningin á flogfarinum og 16 fólk, sum vóru á flogvøllinum, doyðu, tá Airbus 320-flogfarið hjá flogfelagnum TAM fór á glið, júst sum tað skuldi seta seg á Congonhas-flogvøllinum uttan fyri brasilska stórbýin Sao Paulo í gjárkvøldið.

Eftir at flogfarið var farið á glið á teirri vátu lendingarbreytini, rendi tað á eina bensinstøð og síðani á ein bygning hjá TAM tætt við lendingarbreytina. Tey 16 fólkini, sum doyðu á flogvøllinum, vóru í hesum bygninginum, og 12 onnur fingu skaða.

Bjargingarlið og sløkkilið vóru skjót á staðið, men har var lítið og einki at gera. Guvernørurin í Sao Paulo, José Serra, greiddi á tíðindafundi frá, at tað vóru umleið 1.000 hitastig á staðnum, har tað brennandi flogfarið stóð, og at bjargingarliðini fingu tí einki gjørt.

Brasilski forsetin, Luiz Inacio Lula da Silva, kunngjørdi í morgun landasorg í tríggjar dagar, og hann hevur samstundis avlýst allar ferðir og allar fundir hesar dagarnar.

### Ikki óvæntað

Congonhas-flogvøllurin er tætt við stórbýin Sao Paulo ella næstan í sjálvum býnum, og serfrøðingar hava fleiri ferðir ávarað um, at ein flogvanlukka har kann fáa sera álvarssamar avleiðingar.

Harafturat hava fleiri flogskiparar sagt, at lendingarbreytin á Congonhas-flogvøllinum er ov stutt til størri flogfør, skrivar Reuters. Í februar gjørdi ein lokalur dómstólur av, at flogfør av sløgunum Fokker-100, Boeing 737-800 og Boeing 737-700 skuldu ikki hava loyvi at lenda á vøllinum í Sao Paulo, tí hann er ikki nóg tryggur, men ein hægri rættur ógildaði seinni avgerðina.

Brasilskir fjølmiðlar skrivaðu í dag, at tvey flogfør gliðu av lendingarbreytini á Congonhas-flogvøllinum gjáranáttina, men at eingin fekk skaða. Í morgun kunngjørdu myndugleikarnir, at Congonhas-flogvøllurin er stongdur fyribils.

### Tann ringasta

Flogvanlukkan í nátt er tann ringasta í Brasil nakrantíð, men tað eru bara tíggju mánaðir síðani ta næstringastu. Tað var tann 29. september í fjør, tá eitt Boeing 727-ferðamannaflogfar og eitt lítið privatflogfar stoyttu saman í luftini. Vanlukkan kravdi 154 mannalív.

Annars hevur tað verið langt ímillum tær ringu flogvanlukkurnar í Brasil, og vit skulu 25 ár aftur í tíðina fyri at finna ta triðringastu. Hon var tann 8. juni í 1982, tá eitt Boeing 727-flogfar rendi á eitt fjall í mjørka og regni. 137 fólk lótu lív.

# Sviar skulu hava olju úr Eystrasalti

Einar 90 fjórðingar úr landi vænta sviar at fáa 50.000 tunnur upp um dagin.

Fleiri royndarboringar einar 90 fjórðingar í landssynning úr oynni Gotland hava givið so góð úrslit, at nú hava sviar gjørt av at kanna viðurskiftini við framleiðslu fyriu eyga, skrivar TT.

Hildið verður, at økið, sum hevur fingið navnið Vita Zone, kann geva einar 50.000 tunnur av olju um dagin, og at økið verður ført fyri at lata 20 prosent av svensku oljunýtsluni tey næstu 20 árini.

Vita Zone er tætt við polska markið, og polsku megin markið taka oljufeløg millum 15.000 og 20.000 tunnur upp um dagin.

## STUTT SAGT

### Klárur til sak

Myndugleikarnir í Russlandi halda uppá, at russiski ríkmaðurin Boris Beresovskij, sum býr í Bretlandi, beindi fyri fyrrverandi KGB-manninum Alexander Litvinenko í november í fjør. Beresovskij noktar seg sekan og sigur seg vera til reiðar at verja seg í rættinum, men tað er treytað av, at rættarmálið verður í einum óheftum landi. Samstundis mælir hann russaranum Andrei Lugovoj til at gera tað sama. Bretska ákæruvaldið heldur, at tað var hann, sum myrdi Litvinenko, men eisini hann noktar seg sekan.

### 30 ára fongsul

Ein krígsbrotsmannadómstólur í Bosnia hevur dømt muslimin Niset Ramic 30 ára fongsul fyri at hava framt krígsbrotsverk ímóti serbum í borgarakrígnum frá 1992 til 1995. Millum annað varð hann funnin sekur í at hava myrt fýra serbisk sivilfólk í einari bygd nærhendis býnum Visoko. Tíðindastovan AP skrivar, at dómurin ímóti Niset Ramic er tann harðasti, sum er feldur ímóti einum muslimi í Bosnia í sambandi við borgarakríggið.

### So fer hann frá

Sunnudagin verður tjóðartingsval í Turkalandi, og Tayyip Erdogan, forsætisráðharri, hevur nú givið sínum veljarum knívin á barkan. Hann sigur, at kann flokkur hansara ikki skipa stjórn einsamallur aftan á valið, fer hann at taka seg burtur úr politikki. Meiningakanningar hava víst, at AK-flokkurin hjá Erdogan verður førur fyri at skipa stjórn einsamallur, men summir eygleiðarar seg seg ivast kortini.